

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum roynir at selja burturav

**Jógvan Hugo Gardar**

03.12.2015 - 10:36

Oljan.fo

Atlantic Petroleum roynir at selja tvey av trimum loyvum sum fyritøkan í dag hevur framleiðslu í.

Atlantic Petroleum eigur í løtuni í 34 olju- og gassloyvum í bretskum, írskum og norskum sjógvi. Í løtuni er framleiðsla á teimum trimum Chestnut, Ettrick og Blackbird. Harafturat er eitt loyvi har ætlanin er at byrja framleiðsluna í 2016.

Í samband við at fyritøkan í morgun boðaði frá hvussu stór framleiðslan var í november, so sigur felagið eisini at arbeitt verður við at finna keyparar til bæði Ettrick og Blackbird.

Orsøkin til at roynt verður at selja hesi bæði loyvini, har framleiðsla er, er trupla støvan sum oljuvinnan er í, og sum rakar smærri feløg meint.

Manadagin segði Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, at nú berjist fyritøkan fyri at yvirliva.

- Lági oljuprísurin, seinasta árið hevur, eins á onnur oljufeløg, neiliga ávirkan á Atlantic Petroleum. Framleiðslukostnaðurin, úti á oljuleiðunum, er hægri enn oljuprísurin og støðan er tí ikki haldbar. Vit royna enn at fá til vega fígging ella eina loysn á Orlando útbyggingini, sum krevur nógvan pening. Úrslitið fyriliggur um dagar ella vikur, men er óvist. Tó verður mett at enn er møguleiki at koma á mál við fígging ella einari handilsligari loysn. Um so er, at ikki verður komið á mál, er lítið sannlíkt at felagið klárar sínar skyldur í 2016, og tí fer undir umsiting, segðiBen Arabo, stjóri á Atlantic Petroleum, í samband við at hann mánadagin legði fram rokniskapin fyri triðja ársfjórðing.